# Opið brævt til leiðslu og stýrið Kringvarpsins - og ikki minst politiska myndugleikan

STARVSMANNA-FELAGSINS VEGNA

Selma Ellingsgaard, forkvinna

**Sum yrkisfelag hjá 7 av 8 teirra, ið hava fingið hoyringsskriv um uppsøgn, vil Starvsmannafelagið koma við hesi almennu áheitan:**

Starvsmannafelagið harmast almikið, at tað skuldi koma so vítt, at limir okkara hava fingið hoyringsskriv um uppsøgn handað.

At skerja ein stovn, ið frammanundan er skorin inn á bein og longu í dag tørvar fleiri starvsfólk, er høpisleyst. Hevur verið trupult at røkt skyldurnar áður, so hvanan verri hereftir, verður avgerðin ikki endurskoðað.

Kringvarp Føroya, okkara einasti almenni fjølmiðil, ið skal virka óheftur og borga fyri dygd og umboða okkum øll á ein nøktandi hátt, tolir als ikki hesa skerjing!

Tey starvsfólk, ið nú sita við hesum skrivum um høgtíðina, hava tænt stovnunum í mong ár og hava ikki uppiborið hesa lagnu.

Flestu teirra hava fá ár eftir á arbeiðsmarknaðinum og er hetta vána tøkk at bera teimum, ið hava grundlagt og bygt upp útvarp og sjónvarp okkara.

Hvat er endamálið við ikki at vilja stuðla okkara einasta almenna miðli?

Er tað at skerja frælsan tíðindaflutning?

Er tað at niðurpína programvirksemið, sum er meginparturin av senditíðini og týðandi partur av Public Service skylduni?

Er tað at vísa, at tað almenna torir at skerja almenn størv, nú privatu virkini tíverri hava verið noydd at skerja teirra starvsfólkahóp?

Er tað ikki ein alneyðugur glotti í hesum tíðum, at vit hava tíðindi og sendingar at varpa ljós á viðurskifti, ið hava okkara allra áhuga og kunnu vera við at broyta og betra um støðuna?

Er kunning og at grava eftir orsøkum til viðurskiftini ikki ongantíð tíðningarmiklari enn í truplum tíðum?

Eftirlit og stýring av almennu íløgunum og raðfestingunum er prógvað so neyðug sum aldri áður, og her tørvar okkum eitt vælmannað Kringvarp.

Er okkara 4. statsvald veingjaskert, tess minni alment eftirlit og møguleikar at fáa til vega neyðuga kunning til broytingarmøguleikar.

Starvsmannafelagið heitir tí inniliga á tykkum, um at finna aðra loysn enn at siga starvsfólki upp.

Hesar tíðir eru eisini serstakliga lítið hugaligar at verða sendur út í starvsloysi - ikki at tað nakrantíð er tað. Ikki tykkum at siga, so hevur missur av sínum starvi, stóra ávirkan á tann einstaka og eisini samfelagsliga kann tað fáa djúptøknar avleiðingar. Tær avleiddu avleiðingarnar, kunnu kosta okkum øllum so mikið meira.

Í mun til tað konkreta, ið tey sjey hava skrivað í valaskrivinum til Kringvarpsstýrið, verður m.a. víst á, at samstundis sum tey hava fingið hoyringsskriv, so verður sókt eftir journalisti at seta í seinasta lagi 01.02.09

Hetta kann ikki vera rætt.

At siga dugnaligum fólki úr starvi og so søkja eftir øðrum?

Alt annað enn at strika hasa lýsing er burtur úr vón og viti!

Og merkir hetta í roynd og veru, at tað er peningur tøkur, hóast alt?

Eisini vísa tey á, at ikki er roynt at kanna møguleikarnar fyri størvum í niðursettari tíð ella øðrum møguleikum, ið eru verdir at troyta, áðrenn fólk fáa hoyringsskriv um uppsøgn.

Harafturat vil Starvsmannafelgið viðmerkja at sparingin fyri 2009 við at handa hesum 8 hoyringsskriv um uppsøgn, er serstakliga avmarkað.

Tey hava øll starvast so leingi hjá Kringvarpi Føroya, at tey hava øll fulla uppsaganrtíð. Henda er 6 mánaðir umframt fulla summarfrítíð og 6. frívikuna og onnur gjøld, sum avspáking v.m.

So sparingin er so sera avmarkað, í mesta lagi góðar 3 mánaðir komandi ár.

Vit heita eisini staðiliga á Føroya Løgting um at samtykkja at kringvarpsgjaldið verður tikið inn yvir skattin alt fyri eitt.

Hetta er bæði ein solidarisk avgerð og skipan og sum eisini tryggjar at okkara almenni miðil kann virka sum Public Service stovnur.

Tað tykist annars, sum hava vit verið dugnalig at samrátt okkum til ikki minni enn eini 30% í lønarhækkin seinnu árini.

Hevði tað verið so væl.

Tað er samlaði lønarmassin í kringvarpinum, ið er vaksin hesi 30 % og eru tað ikki limir okkara, ið hava fingið 30 % í lønarhækking og ei heldur bera bróðurpartin av hesi hækking.

Tað er tó sera álvarsamt, at ein stovnur skal avhalda lønarhækkingar og ikki hava møguleikan at fígja hesa.

Tað er reelt at binda fakfeløgini niður og stýra, so at lønarhækkingin fær ta avleiðing, at okkara limir antin missa sína størv ella at stovnurin gerst undirmannaður.

Skilji tað, hvør ið skilja vil.

Vit kunnu ikki góðtaka hesa niðurbinding.

Starvsmannafelagið mælir staðiliga pørtunum at seta seg niður at finna eina virðiliga loysn á málinum. Hoyringsfreistin er úti 14.01.09 og tí er rúm tíð, at partarnir kunnu arbeiða við málinum.

Tað er so sanniliga eisini í hesum døgum, at tað neyðugt at lyfta í felag og finna skilagóðar loysnir.

# Uppsagnir og vánaligar leiðslur

JÓHAN J. JAKOBSEN

Nú tíðirnar versna, verða fólk søgd úr starvi bæði her og har. Einki løgið er í hesum, tí tá rakstursin ikki hongur saman longur, má okkurt munagott gerast, so fyritøkan ikki fer fyri bakka. Tað sum tó er undrunarvert er arbeiðslagið, ið nýtt verður, tá hetta verður gjørt. Hóast avvarandi fakfeløg siga, at rætt er farið fram samsvarandi sáttmálum, hongur ikki saman moralskt.

Menniskju, sum eru byrjað blaðung á einum stovni og hava tænt har eitt langt lív, verða tveitt út eini 5 – 10 ár undan eftirlønaraldri og hava ongan verðsins møguleika at finna sær nýtt arbeiði. Tey eru liðug á arbeiðsmarknaðinum, tí førleikarnir, tey hava fingið við í skjáttuna frá fyritøkuni, kunnu ikki nýtast til nakað skilagott.

Framda valið, hvør skal út og hvør ikki, tykist mangan tilvildarligt. Eingin starvsfólkapolitikkur er, og eingin veit tískil, hvussu er valt. Er tað starvsaldur, fakligur førleiki, lønarkostnaður, klókskapur ella býttleiki, hevur viðkomandi hildið seg væl í ogn við skeivar persónar, ella er tað okkurt heilt annað, sum ger seg galdandi, tá veljast skal. Dúgliga verður gitt.

Í tíðini fólk hava verið í starvið, hava tey ongantíð fingið at vita, hvat tey hava gjørt rætt ella skeivt, hvat er gott ella minni gott, so tey kundu ment seg innan økið, har tey eru minni væl fyri, og tí ognað sær teir førleikar, sum kravdust, tikið skeið, eftirútbúgving, broytt atburð um tað var neyðugt o.s.fr.

Í sálarfrøðini verður sagt, at fólk fata bert 10% av tí, sum sagt verður við tey, restina, 90%, fata tey út frá atburði, kropsburði, tónalagi á røddini o.s.fr. Boðskapurin til starvsfólkið, sum eftir situr á slíkum stovni, er tí heilt greiður. Starvsaldur hevur onki at siga her í fyritøkuni, og leiðslan tekur ikki ábyrgd av sínum starvsfólki. Tit fáa heldur ikki at vita hvørjar førleikar, vit leggja áherðslu á. Tá vit meta ikki at hava brúk fyri tykkum longur, verða tit tveitt á dyr.

Undarligt annars at ein leiðsla kann fáa eitt óskrivað blað til arbeiðis, og so siga viðkomandi upp 40 ár seinni, tí tað ikki hava førleikarnar, sum krevjast at arbeiða í fyritøkuni. Spurningurin er tí, hvør er ódugnaligur, og átti leiðslan heldur at staðið fyri skotum, tí teir hava ikki megnað at ment førleikan hjá sínum starvsfólkum til tað, stovnurin hevur brúk fyri.

Ein dugnalig leiðsla eigur at fara inn í eitt mennandi samskifti við starvsfólkið, eisini tá uppsagnir eru á dagsskrá. Hetta krevur tó sín mann, og flestu leiðslur megna hetta ikki. Tær tora snøgt sagt ikki, at seta seg yvirav starvsfólkinum, og greiða frá støðuni, uppsøgnini og møguleikum annars. Tí kemur uppsøgnin oftani á ein ófantaligan hátt, har starvsfólk nærum verða biðin um at skrubba av frá degi til dags.

Tað kundi jú verið at fleiri eru áhugað at fara niður í hálva ella kvart tíð, kanska onkur vil sleppa í farloyvi til lestur, at ansa ommu og abbabørnum, sjúkum, kanska onkur hevur hug at gevast nøkur ár undan eftirlønaraldur, at flyta til annað arbeiðsøki o. s.fr. Møguleikarnir eru fleiri, men verða ikki troyttir, tí leiðslan er ódugnalig, stutt og greitt.

Nevndirnar, sum skulu eitast at hava eftirlit við leiðsluni á einum stovni, eru eins ódugnaligar. Tær eru ikki førar fyri at seta fram krøv um m.a. ein starvsfólkapolitikk, men eru bert har, ofta valdar í “venners vold” og sjáldan sambært førleikum.

Franskmenn høvdu undir 1. veraldarbardaga eina skipan teir nevndu fyri decimering. Um ein herdeild kom aftur og hevði tapt ein bardaga, vóru teir menn, sum enn vóru á lívi, stillaðir á rað. Yvirmenninir gingu síðan fram og skutu 10. hvønn mann av sínum egnu. Boðskapurin var greiður, vinn!

“Rule by fear” verður hetta nevnt á enskum, og var hesin leiðsluháttur nógv nýttur fyri 100 árum síðani. Í Føroyum verður hann tó nýttur enn.

# Ljós runt um vatnið í Vági

GUDMUND LARSEN Y

Ljós runt um vatnið í Vági, ja og hvat so? Tað er væl, tað teir persónar hugsa, sum nú eru farnir í hernað ímóti hesum arbeiði og vilja knúsa tað sundur, ja tað sum skuldi verða ein gáva til okkum øll sum búgva her í Vági.

At eg seti meg niður og skrivi nakrar reglur um hetta, geri eg fyri at vísa mína tøkk til teir menn sum hava gingið í regni, kava og stormi har vestari á Eiðinum og gjørt sítt fyri at hesi ljós skuldi lýsa, nú jól, og nýggjár vóru í hondum.

Tað fyrsta eg hugsi um, tá eg síggi, hvat er við at henda við ljósinum vesturi á vatninum í Vági er tann tíðin eg var í Svøríki, har eg sjálvur arbeiði hjá kommununi.

Eg var ein av teimum sum var við til at rudda og halda býin reinan, so at tey sum høvdu valt at seta búgv har, altíð kundi gleðast um, hvussu reint, og væl alt var hildið.

Tað sum eg kanska minnist allar best, var hvussu alt fekk frið. Aldrin kann eg minnast, at eg nakrantíð kom fram á eitt brotið ruskílat ella eina brotna lampu av nøkrum slag, og tað var líkamikið, um tað hevði verði dansur ella nakað annað ball í býnum.

Tí undrar tað meg eitt sindur, at vit sum búgva her á hesum stað, ikki kunna gleðast á ein líka hátt, og ikki minst verða líka góð við okkara stað, sum eg upplivdi at tey vóru við sín bý, har eg arbeiði í Svøríki.

Eg vóni at tey sum hava gjørt tað ljótu ger vesturi á Vatninum í Vági, vilja blíva avdúkaði sum skjótast, so at tað ikki hendur aftur.